## VEÐRIÐ




**Veðrið hósdag – skírisdag**
Ælaveður við sólarglottum. Vestanvindur, 5 til 10 m/s, sum so líðandi minkar. Hitin um dagin um 5 stig, um náttina millum 2 og 5 stig.




**Veðrið fríggjadag – langafríggjadag**
Turrveður við sólarglottum. Vindur av útsynningi, 3 til 8 m/s. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið leygardag – páskaaftan**
Skýggjað og seinni regn. Vindur av útsynningi, 5 til 10 m/s, sum seinni snarar í ein vestan. Hitin millum 4 og 8 stig.

**Veðrið sunnudag – páskadag**
Skýggjað við ælaveðri, vestanvindi 5 til 10 m/s. Hitin millum 3 og 6 stig

## DAGSINS FØROYINGUR

# »Eg geri eina fløgu«

**Á matstovuni umborð á Norrönu hitti Sosialurin 16 ára gomlu Poulu Grunnveit. Poula býr í Havn og gongur dagliga í Kommunuskúlanum, men seinastu vikuna hevur hon verið á skíðferð í Voss í Norra.**

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*



*Á myndini er Poula Gunnveit umborð á Norrönu, men so skjótt hon kemur heim, fer hon at taka eina fløgu upp saman við systur síni.*

**■ Hvat gert tú dagliga?**
– Hugni, flenni og stuttleiki mær saman við vinum. Eisini svimji eg tvær ferðir um vikuna. Í løtuni eri eg somuleiðis í holt við at gera eina nýggja fløgu saman við systur míni, Randi. Í fyrstu atløgu fara vit bert at geva familju og vinum eitt avrit av fløguni, tí tað er so kostnaðarmikið at geva hana út í handlum. Á fløguni verða andaligir sangir, ið ein kona í Haldarsvík hevur skrivað.

**■ Hvussu dámdi tær at standa á skíðum?**
– Mær dámdi væl at vera í Voss. Ì byrjanini var tað heldur trupult at fara oman eftir skíðbrekkunum – eg datt fleiri ferðir, men fekk tó ongantíð ilt. Eftir eina tíð var eingin trupulleiki at gera við fullari ferð omaneftir. Eg royndi fleiri skíðbrekkur – bæði fyri roynar og óroyndar skíðrennarar. Um kvøldið var eg sera troytt, men hóast hetta fór eg glað upp hvønn morgun og niðan aftur í fjøllini at skíða. Eg havi verið í Voss í eina heila viku, men tími ikki heim hóast hetta. Men hvør veit – kanska eg fari aftur á skíðferð næsta vetur?

**■ Hvat hevur tú gjørt umborð?**
– Tað rullar eitt sindur, so eg havi sovið eina løtu. Annars havi eg bara gingið mær ein túr á bátinum, keypt sodavatn í dós og góðgæti í hópatali. Somuleiðis havi eg keypt eina bamsu til systurdóttir mína. Hon elskar Palla Pumm og kompagni. Júst nú havi eg annars etið á Norröna Buffét. Tað smakkaði væl. Í kvøld verður dansur umborð, og tá fari eg í øllum førum at lurta og kanska eisini dansa onkran dans.

**■ Hvørjum vilt tú heilsa?**
– Eg vil fegin senda eina serliga heilsu til mammu og mína bestu vinkonu, Onnu Herlu.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -- |
| Ammassalik | -- |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | -- |
| London | 9 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 3 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 6 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 11 |
| Bukarest | 11 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 14 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 20 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 12 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 29 |
| New York | 19 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 25 |
| Panama | -- |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 23 |

### LUFTTRÝSTIÐ






**Veðurvánirnar**
Eitt lágtrýst, 982 hPa við Ísland ferðast móti eystri. Eitt annað lágtrýst, 990 hPa sunnanfyri Kappan ferðast eystureftir og grynnist, og fer suður um Føroyar mikukvøldið. Eftir tað kemur køld luft við ælaveðri inn yvir Føroyar av útnyrðingi og vestri.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/4 kl. 06⁰⁰– 12/4. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,2°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,3 mm – mált frá 11/4 kl. 06⁰⁰– 12/4 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 31,6 mm

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. Apríl | 06.37 | 18.55 | 05.37 | 17.55 | 05.52 | 18.10 | 08.37 | 20.55 | 09.37 | 21.55 | 04.52 | 17.10 | 03.52 | 16.10 | 06.52 | 19.10 | 07.52 | 20.10 | 06.22 | 18.40 | 07.37 | 19.55 |
| 13. Apríl | 07.13 | 19.32 | 06.13 | 18.32 | 06.28 | 18.47 | 09.13 | 21.32 | 10.13 | 22.32 | 05.28 | 17.47 | 04.28 | 16.47 | 07.28 | 19.47 | 08.28 | 20.47 | 06.58 | 19.17 | 08.13 | 20.32 |
| 14. Apríl | 07.51 | 20.11 | 06.51 | 19.11 | 07.06 | 19.26 | 09.51 | 22.11 | 10.51 | 23.11 | 06.06 | 18.26 | 05.06 | 17.26 | 08.06 | 20.26 | 09.06 | 21.26 | 07.36 | 19.56 | 08.51 | 21.11 |
| 15. Apríl | 08.31 | 20.52 | 07.31 | 19.52 | 07.46 | 20.07 | 10.31 | 22.52 | 11.31 | 23.52 | 06.46 | 19.07 | 05.46 | 18.07 | 08.46 | 21.07 | 09.46 | 22.07 | 08.16 | 20.37 | 09.31 | 21.52 |
| 16. Apríl | 09.13 | 21.36 | 08.13 | 20.36 | 08.28 | 20.51 | 11.13 | 23.36 | - | 12.13 | 07.28 | 19.51 | 06.28 | 18.51 | 09.28 | 21.51 | 10.28 | 22.51 | 08.58 | 21.21 | 10.13 | 22.36 |

GEV BLÓÐ



Les Sosialin so ert tú við

Sosialurin

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Fjeppari?
Les um ítrótt í Sosialinum



5 707265 100036 >